**UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ**

# Stuðul til film 2023 – fyrra umfar

Uttanríkis- og mentamálaráðið lýsir við hesum møguleikan at søkja um stuðul til film í 2023.

Stuðulin kann veitast til ymsar tættir innan filmsgerð, harundir hugskots- og handritsmenning, undanframleiðslu, framleiðslu, eftirframleiðslu og útbreiðslu. Stuðulin kann verða játtaður einstaklingum, bólkum ella feløgum.

**Freistin at søkja er 1. februar 2023.**

**Seinna umfar verður lýst í summar við freist 1. september 2023.**

Stuðulin til film var 3,5 mió. kr. í 2022, og stuðulin til film í 2023 er treytaður av játtan á fíggjarlógini fyri 2023.

---

Allar umsóknir skulu skrivast á serstakt umsóknarblað til endamálið og skulu sendast sum pdf-skjal. Umsóknarblað við vegleiðing er á heimasíðu Uttanríkis- og mentamálaráðsins: *www.ummr.fo* ella fæst við at venda sær til:

**Uttanríkis- og mentamálaráðið**
**Tinghúsvegur 5-7**
**Postrúm 3279 - 110 Tórshavn**
**Telefon 30 65 00**
**e-postur: ummr@ummr.fo**